# IKKI EIN GARÐUR MEN EITT BARNAHÚS



» Vit fáa hvønn einasta dag nakrar gimsteinar ella gullklumpar lætnar upp í hendur av foreldrunum

NANCY POULSEN, LEIÐARI

**BØRN** - Tað er við vilja, at vit hava valt at kalla henda stovnin fyri eitt barnahús og ikki ein barnagarð, sigur Nancy Poulsen, leiðari á nýggja barnahúsinum Sellin *(úttalast Sedlin)* á Skála. - Hetta skal snøgt sagt vera eitt hús við børnum

Orð&myndir: Snorri Brend

**Skáli:** Hóast nýggja barnahúsið ikki er tikið alment í nýtslu enn, hevur tað longu verið í brúki í fleiri dagar.

Tørvurin og spenningurin eftir at lata børnini sleppa í nýggja bygningin, var so mikið stórur, at tikið varð ímóti fyrstu børnunum longu í farnu viku.

Her er í fyrstu syftu pláss fyri 32 børnum, men fyribils eru bert tvær av íalt fýra stovum tiknar í nýtslu.

- Vit vóna, at hinar báðar verða tiknar í nýtslu skjótt. Tørvurin á teimum er í øllum førum til staðar, vísir Nancy Poulsen á.

» Slíkur stovnur eigur at verða rikin soleiðis, at sagt kann vera um tey sum hava fingið partvísan uppvøkstur haðani, at hann ella hon er ein hendinga selli ella sella

TORBJØRN JACOBSEN, UPPSKOT TIL NAVNIÐ

Tað er byggifyritøkan Búsetur sum hevur bygt hetta nýggja barnahúsið, sum á mangar mátar minnir um barnagarðin í Søldarfirði. Hesin lat eisini upp mánadagin í farnu viku.



*Í løtuni eru 32 børn í barnahúsinum Sellin á Skála. Her hava tvær "sellur" tikið súkklurnar fram*

- Umstøðurnar her eru í øllum førum sera góðar, staðfestir leiðarin í barnahúsinum Sellin.

### Eitt HÚS

Tað var tó ikki av tilvild ella tikið úr leysum lofti, at barnahúsið júst fekk hetta navnið.

Til tess at finna stovninum eitt hóskandi navn varð lýst við eini navnakapping fyrr í ár. Áhugin fyri kappingini var stórur, tí fleiri uppskot komu inn.

- Vit tosaðu beinanvegin um, at hetta skuldi vera ein navnakapping til eitt barnahús og ikki ein barnagarð, sum jú er eitt meiri danskt orð, greiðir Nancy frá.

Eitt av uppskotunum var frá tingmanninum og nýggja havnafútanum í Runavík, Torbjørn Jacobsen. Mett varð, at hetta navnið á ein sera góðan hátt lýsti endamálið við barnahúsinum.

- Ein sella er eitt sjáldsamt føroyskt orð, sum bæði kann merkja ein sterkur og raskur drongur, ella sterk og røsk genta.

- Og tað ynskja vit eisini, at tað næsta ættarliðið skal verða: Børn sum fara hiðani av stovninum, bæði røsk og sterk, slær Nancy Poulsen fast.

### Gimsteinar

Í fyrstu syftu eru tvær av stovunum tiknar í nýtslu, har børnini í ymsum aldrum fáa ta tænastuna, hjálp og umsorgan, tey hava brúk fyri í tí dagliga.

Á sunnaru síðu er eitt stórt øki